## Burturm. /funnið

**BLÁ BARNASÚKKLA**
blivin vekk í Tróndargøtu. Merki: Winther.
*Tlf. 319340/223054*

**FYRI UMLEIÐ**
2-3 mðr. síðani misti eg gullarm-bandið burtur, møguliga í Runavík. Hevur nakar funnið tað? Vinarliga ring
*tlf. 211045*

## Býli í Føroyum

**UNGUR DRONGUR**
søkir íbúð í Havn. Max. prísur 3.500,-
*Tlf. 316162/266448*

**LÍTIL HÚS TIL SØLU**
Húsið er 3 x 2,4 m til støddar. Í húsinum hevur bert staðið ein mjólkatangi. Klætt innan við hvítum fibotex plátum 11 mm. Húsið er bjálva og el er innlagt. Meiri fæst at vita við at ringja til
*tlf. 421252 ella 211252*

**HÚS Á TVØROYRI TIL LEIGU**
Til ferðandi sum ynskja hús-innivist eina weekend ella longri, kontakta:
*Tlf. 261884*

**ÍBÚÐ TIL LEIGU**
60 m2 Íbúð í Havn til leigu til friðalig ikki-roykjandi.Tlf. 504370, 0045 61703990
*E-mail: rent4me@sol.dk*

**SETHÚS Í HOYVÍK TIL LEIGU**
Frá 1. januar til 1.september 2006 4 kømur, 2 stovur, køkur, wc, bryggers, úthús, hjallur. Verður leiga við møblum eftir ynski til fólk sum ikki roykja. 7.500 kr. uttan el og hita.
*Ring 226906/319626*

**HEY!**
Er tað nakar í Havnini, ið kann hjálpa okkum? Vit eru eitt ungt par fyrst í 20'unum, sum mangla eitt stað at búgva í, men vegna skúla og læruppláss er ikki møguleiki fyri at leigan er meir enn 2.500,- max 3.000,- við øllum. Vit eru fitt og ordilig fólk at hava búgvandi, eru friðalig og fara væl um. Hevur tú eina íbúð til okkum?
*Vinarliga ring 254294/584559*

**KAMAR TIL LEIGU**
Kamar til leigu á Argjum við øllum hentleikum.
*Tlf. 227745*

**TRONGISVÁGUR**
Grundstykki 844 fermetrar bíliga til sølu.
*Tlf. 371166*

**KJALLARAÍBÚÐ**
tilleigu, 45 fermetrar, nærhendis SMS, kostnaður 3.600 mán. 1 mðr. dep.
*Tlf. 220586/219515*

**VIT ERU EITT UNGT PAR**
sum ynskja eina íbúð 1 Oktober í Havn. Vit eru friðarlig, fara væl um, og roykja ikki. Max 4000 4500 kr v/ el og hita um mánan.
*Tlf. 756735*

**HÚS TIL LEIGU Á TOFTUM**
Hús til leigu mitt á Toftum við góðum útsýni.
*Ring á tlf 447246 ella 222979*

**VIT ERU EITT UNGT PAR**
ið leita eftur einari íbúð!! Íbúðin má helst hava tvey kømur,og prísur max 6000 við ljós og hita. Bæði hava fast arbeiði!!! Má vera í Tórshavn, alt hevur áhuga
*Tlf 252638 e. kl.15 ella 258514 e. kl. 17*

**ÍBÚÐ YNSKIST**
Lesandi par í 20unum søkir íbúð, við einum ella tveimum kømrum, í miðstaðarøkinum - fyri uml. 4000 kr um mánaðin við øllum íroknað. Vit gjalda til tíðina og fara væl um. Vinarligast ringið á tel. 580262 ella sendið ein teldupost á
*ikaroz@icqmail.com*

**VEGNA SERLIGAR UMSTØÐUR**
ynskja vit hús ella grundstykkið i eysturbýnum,møguliga í býti við okkara, gott 2 ára gamla, snotiliga tvíhús í vesturbýnum. Send ein mail til
*sethus@email.fo.*

**STÓRT KAMAR**
til leigu við atgongd til køk, bað, vaskimaskinu, nær við læraraskúlan.
*Tlf. 221158/313799*

**KAMAR**
Eitt kamar í miðbýnum til leigu.
*Tlf. 311726/756726*

**YNSKIST**
Kamar/íbúð í Havn ynskist, max. 3.000,- við ljós og hita.
*tlf. 256416*

**HÚS TIL LEIGU**
Møblerað randarhús á Torkilsgøtu við Løgmannabreyt.Til leigu frá hálvum oktober og min. 6 mðr fram. 3 kømur. Kostnaður 6500 kr +ljós/hita.
*Tlf. 321132 ella 594556*

**ÍBÚÐ MITT Í HAVN TIL LEIGU**
Ein stór kjallaraíbúð miðskeiðis í Havnini er til leigu beinanvegin. Gongd, stórur køkur, stór stova, stórt kamar, baðiverilsi og goymslurúm.
*Skriva til ph@kallnet.fo*

**HÚS Í HALDÓRSVÍK**
til sølu fyri hægst bjóðandi. Húsini eru í 3 hæddum, 2 etagur eru innrættaðar og kjallarin er stoyptur. Á loftinum eru 1 hjúnakamar (útbygningur) 3 barnakømur, wc og gongd. Á stovuhæddini er ein stórur køkur og stova og gongd. Húsini hava nýtt tak og trækløðning. Stoyptur garður er rundanum og stórt úthús er á stykkinum. Ring og hoyr nærri eftir kl. 16.00 á
*tlf. 217686*

**ER TÚ FRIÐARLIGUR**
og fer væl um, havi eg nøkur kømur til leigu við atgongd til køk og bað frá 1. oktober.
*Tlf. 316916 ella 506489*

## Býli uttanlands

**GÓÐ ÍBÚÐ Í VALBY**
Góð íbúð í Valby til leigu frá 3.des. 2005 til 12. jan. 2006. 4.500 kr. um mánaðin ella eftir avtalu.
*Ring +45 40384889*

**ÍBÚÐ Í KBH. Í HEYST OG VETUR**
1 ver. møblerað íbúð við hava í Høje Tåstrup. Liggur sera væl fyri við toksamband til Kastrup og miðbýin. Stórt innkeypssentur og Ikea tætt við 1.500 kr. pr. viku.
*Tlf. 512028 og 0045 27181914*

**HEYSTFRÍTÍÐ Í KBH.?**
Ein 1 rúms kollegieíbúð vid te-køki er til leigu frá 13. okt. til 23. okt. Íbúðin er fult møblerað og er á Amager, tætt vid metro og buss. 1000 kr fyri 10 dagar ella eftir avtalu.
*tlf: 332627 / +45 40407004 (Annika)*

## Dýr

**RYSSA TIL SØLU**
6 ára gomul ryssa til sølu.
*Áhugað ringi 508895*

**HVØLPUR/TÍK**
Ein sera fittur 5 mðr gamal hvølpur/tík verður latin til djóravin. Mamman er ein west highland white terrier. Hvølpurin er myrkur á liti og sera fittur.
*Tlf. 220942 eftir kl. 16*

**KANIN YNSKIST**
Er tað nakar sum eigur eina ella tvær kaninir (honir) at selja mær. (ikki dvørgkaninir). Eg eri djóravinur og pápi sigur at eg dugi væl at passa djór. Eg eigi eina kanin, sum trívist sera væl. Men eg haldi hon er so einsamøll. Heilsan Elisabet Maria Pálsdóttir
*Tlf. 441536*

**AKVARIUFISKAR TIL SØLU**
3 svartir skalar og 6 reyðir sværddrager.
*Tlf. 217408*

**VATNSKJALDBØKA TIL SØLU**
Selist við akvarium 40 l. og tilhoyr fyri 400,- kr.
*Tlf. 310609*

**PUNG ROTTIR**
3 pung rottir til sølu.
*Tlf. 217430*

**DVØRGAHØNUR TIL SØLU**
3 dvørgahønur og 1 dvørgahani til sølu.
*Tlf. 321702 ella 582976*

**KETTLINGAR**
3 sera fittir kettligar verða latnir djóravinum. Mamman er angora, og kettligarnir eru lodnir.
*Tlf. 252686*

**VEGNA SERLIGAR UMSTØÐUR**
søkja vit eftir einum heimi til frens okkara, hann er 5 mðr. hann er koksgráur, reinligur og sera góður í sær. Verður bert latin djóravinum.
*Tlf. 263323*

**DVÆRGVÆDDER**
innikanin, til sølu. Er umleið 5 mðr gomul. Alt tilhoyr fylgir við, bæði inni og útibúr.
*Ring 250955*

**AKVARIUM TIL SØLU**
Akvarium á ca. 35 litrar, við varmalikami og pumpu, til sølu fyri 500 kr. Vinarligast ringið á tel. 276758 ella sendið ein teldupost til
*djurhuus220984@hotmail.com*

**TVÆR SKJALDBØKUR TIL SØLU**
Tvær skjaldbøkur (10 mánaðar gamlar) til sølu við akvariumi (54 litrar), pumpu og nýggjum varmalikami fyri 1500 kr. til djóravin. Vinarligast ringið á tel. 276758 ella sendið ein teldupost til
*djurhuus220984@hotmail.com*

**MARSVÍN**
Okkara fittu marsvínaungar, Felix og Figaro eru klárir at flyta heimanífrá. So um tú ert ein rættur djóravinur, kanst tú fáa báðar fyri 150,- kr.
*Tlf. 322234*

**GOLDEN RETRIVER HVØLPAR**
til sølu, kunnu latast uml. viku 48/49. Bert til djóravinir. Skulu helst bíleggjast sum skjótast.
*Tlf. 442764/273064*

**HEYSTLAMB**
Trý lítil veðurlomb til sølu fyri kr. 450,- stk. Bert í Eysturoy.
*Tlf. 423147/273844*

**FUGLABÚR TIL SØLU**
Fuglabúr til undulát bíliga til sølu, ymisk útgerð er við.
*Ring 214789*

**TIL SØLU**
6 mðr. gamalt fyl er til sølu, tað er undan norskum greðingi og sera góðari ryssu.
*Ringið 721168*

**TIL SØLU**
Eitt akvarium 30 l. við tilhoyri til sølu.
*Tlf. 255279*

**UNDULÁTAR**
2 undulátar, hon og hann, 1 grønur og ein bláur og eitt búr, verður selt saman 650,- kr.
*Tlf. 504497*

## Fartelefonir

**SIEMENS MC60 BÍLIGA TIL SØLU**
Ein sera væl viðfarin 1-ára gomul Siemens MC60 við fototóli og øðrum til sølu. Hon sær út og riggar sum spildurnýggj. Til sølu fyri 950 kr.
*Vinarligast ring 227531. Skúladagar eftir kl 15.15*

## Fundir

**TIL SØLU**
Turkitrumla við útføring. AEG Lavatherm 37700. Sum nýggj. Sera lítið brúkt. Uppvaskimaskina, innbygd. Í sera góðum standi. ASEA Cylinda 1500 (nú ASKO).
*Tlf. 510101*

**AÐALFUNDURIN**
í Mentanarhúsfelagnum í Runavíkar kommunu verður hildin í býráðshøllini í Runavík mánadagin 17. oktober 2005 kl. 19.30.
*Nevndin*

## Húsarhaldstól

**KØLI- OG FRYSTISKÁP TIL SØLU**
Stórt køliskáp við frystiskápi í erva, hvørsína hurð, opnast til høgru (kann vendast). Í góðum standi bíliga til sølu
*Tlf. 509917 ella 540971*

**TIL SØLU**
Kolkomfýrur til sølu.
*Tlf. 421252 ella 211252*

**VASKEMASKINE**
Vaskemaskine topbetjent, virker ok. pris: 500 kr.
*Mobil 271827*

## Innbúgv

**SOFABORÐ**
Skifer sofaborð við stálbeinum til sølu. Støddi: 1,30 m langt, 0,75 m breitt og 0,48 m høgt.
*Tlf. 223987*

**SOVISOFA**
Ein sovisofa í góðum standi til sølu fyri 600 kr.
*Tlf. 514451 í Havn*

**HORNASOFA**
Grá leður hornasofa til sølu fyri 300,- kr.
*Tlf. 216240*

**ROKOKO GAVLUR**
180 x 200 mahogny + 2 náttborð. Boxmadrassa 160 x 200 v/ boylum, 5 antik gomul radio, eikiborð 160 x 90 v/ stólum.
*Tlf. 258105 eftir kl. 17*

**HORNASOFA**
Myrkabrún hornasofa úr leðri til sølu.
*Tlf. 313448*

**VEGNA PLÁSSTROT**
verður karrygul sofa seld fyri kr. 400,- Stødd: l. 190xh.80xb. 85.
*tlf. 316053/251197*

**KØKUR TIL SØLU**
Góður, brúktur køkur úr massivari furu lakeraður, einans 7 ára gamal. Til sølu vegna umbygging.
*Tlf. 310306/553895*

**TIL SØLU**
Góð skipsbriks (70x190) til sølu við skúmgummi madrassum og 2 skuffum undir.
*Tlf. 314089*

**HORNASOFA**
fæst við at avheinta hana, hon er betrekt við stoffi.
*Tlf. 277371*

**STÓIUR TIL SØLU**
Ein vælviðfarin lítið brúktur Simo Bertini stólur við lufthjólum til sølu fyri 2000 kr. Posi, seðlar, regnslag + pumpa fylgja við. Hevur hondtak, ið kann regulerast og kann vendast við.
*Tlf. 226252*

**YNSKIST**
Ein messing-ljósakrúna ynskist til keyps, skal helst hava 6 armar.
*Vinarliga ring tlf 214133 ella 318485*

**MØBLAR BÍLIGA TIL SØLU**
Hornasofa, stólar, sofaborð, spísiborð, spegl, skenkur, persiennur. Kann keypast saman ella hvør sær.
*Tlf. 263733*

**TIL SØLU**
Hvítt spísiborð 90x180 + eyka plátu og 6 stólar. Nýprísur 3.500 kr. Nú 2.000 kr.
*Tlf. 328069*

**STÓLAR SÓKNAST!**
Eg sóknist eftir 2-4 gamalgags stólum til kamari hjá mær. Eg hugsi um stólar, ið eru antik líknandi! Helst so bíligar sum møguligt!! Um tit hava áhuga,
*so ringi 227531*

**KOMBINERAÐ**
kulda- og frystiskáp h. 175 x b.60 x d.60 og ein komfýrur, bíliga til sølu.
*Tlf. 318243*

**HVÍT TREMMUSONG TIL SØLU**
eina síðan og botnurin kann flytast upp og niður. Nýprísur 1.300 kr. til sølu fyri 600,- kr. v/ madrassu.
*Tlf. 262587*

**YMIST TIL SØLU**
Sofaborð 200,-kr.
Sofaborð fínt Nýprísur 2.500 nú 1.200,- kr.
Skiftiborð 200,- kr.
2 skápshurðar 132x49 150,- kr.
1 timburskáp lítið 200,- kr.
Køksborð stórt 600,- kr.
6 stólar fínir; nýprísur 800,- nú 300 kr. stk.
2 stólar 200 kr. stk. Tennisketsjari 300,- kr. Badmintonketsjari 100,- kr.
Barnamadrassa 140x65 200 kr.
Kontórborð 120x80 1.000,- kr.
Kontórborð 164x80 1500 kr.
Aiwa stereoanlegg til 3 cd, nýprísur 4.000 nú 1.500,- kr.
El-ovnur 2000W 500,- kr.
*Tlf. 224910*

## Lutaseðlar

**LUTASEÐLARNIR HJÁ GULIGANZ**
sum skuldu verða trektir 8. oktober eru útsettir til 26. november.
*Guliganz*

**LUTASEÐLASØLAN HJÁ TVØROYRAR BÓLTFELAG**
Trekt bleiv 4. sept. og lýst viku seinni, men lutur nr. 2, sum fall á seðil nr. 04073 er framvegis ikki heintaður. Vinnarin kann ringja tlf. 371278 ella 371725. Um vinningurin ikki er avheintaður innan 4. november 2005, fellur vinningurin aftur til felagið. Takk fyri stuðulin.
*Tlf. 371278 ella 371725*

**SUÐURÆTTIN OG VÁGS SKÚLAORKESTUR**
5. oktober hevur Notarius Publicus fyri Suðuroyar sýslu drigið fylgjandi lutaseðlar til frama fyri Suðurættin og Vágs Skúlaorkestur, 900 Vágur. 1) 0916. 2) 2435. 3) 0877. 4) 0431. 5) 2707. 6) 2438. 7) 2701. 8) 0649. 9) 0602. 10) 2524. Ringjast kann á
*tlf. 373701*

## Matur

**SKORNAR RABARBUR**
til sølu fyri 25,- kr. kg.
*Tlf. 448173/218173 eftir kl. 19*

**HEILIR NEYTAFJÓRÐINGAR**
sera bíligir og góðir til sølu. Ring og hoyr nærri. Høvdarhagagarðurin v/ Jóhan Petur Kjærbo, bóndi.
*tlf. 361188/361788/225288, Skopun*

**TIL SØLU**
Krov og avroð kunnu bíleggjast nú.
*tlf. 504599/422410*

**AVROÐ**
bíliga til sølu
*Tlf. 421094*

## Pløgg

**YNSKIST**
Búni Havnar Fimleikarfelag ynskist til keyps. Stødd 10-12 ár.
*Tlf. 310676/271889*

**EITT BLÁTT SILKI**
broderað turriklæð og fyrriklæð til føroyska búnan til sølu.
*Tlf. 312156*

**VÓNARBUKSUR**
Óbrúktar cowboy str. L. vónarbuksur til sølu fyri 300,- kr.
*tlf. 281245*

**6 KNAPPAR TIL FØROYSKAN VEST**
Av tí gamla sniðinum, 12mm tvørmál og 10 mm hædd við eyganum, Helst við kaparfóti - ynskist til keyps. Skriva til Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn
*Bill. mrk. 2181-11*

## Sjavs

**SJAVSKAPPING**
verður mikukvøldið 19. oktober kl. 18.45.
*Eldrafelagið Nón*

**SJAVSKAPPING**
verður á Svangaskarði mánadagin 17. oktober kl. 18.30.
*Tofta Ítróttarfelag*

**SJAVSKAPPING**
Almenn sjavskapping verður í HB-húsinum í Gundadali týsdagin 18. okt. kl. 19.00.

## Súkklur

**SÚKKLUVOGNUR**
Súkkluvognur (treylari). Plastbalja í stálrammu.
*Tlf. 510101*

**TIL SØLU**
Svartur Popcorn skutari, krevur smávegis ábøtur, hevur nr. plátur, til sølu fyri bert 4.500 kr.
*Tlf. 504851/504904*

**YNSKIST TIL KEYPS**
Er tað nakar, ið kann selja mær eina Aprilia RX, ella eina Gilera RCR í góðum standi.
*Tlf. 322185/508275, Bartal*

**EIN YAMAHA AEROX TIL SØLU**
Er frá 2001. Hevur tun deilir, men lovligan variator. Onga nummar plátu. Hevur koyrt 6900. Við nýggjum cylindara hevur hann koyrt ca. 2800. Kostnaður 13.000 kr.Kanst síggja hann inná www.sel.fo
*Tlf. 264448*

**3 FALLHJÁLMAR TIL MOTURSÚKKLU**
Til sølu. Prísuppskot 150 kr. fyri hvønn.
*Tlf. 313392*

**PEUGEOT SPEEDFIGHT II SKUTARI**
1 1/2 ára gamal. Lítið brúktur, sær út sum nýggjur, til sølu.
*Tlf. 315891 ella 515891*

**TIL SØLU**
Derbi Senda R í góðum lógligum standi til sølu fyri 10.000,- vegna keyp av motorsúkklu.
*tlf. 361167 ella 361547*

**WINTHER TRÝHJÓLINGUR**
lítið og onki brúktur, til sølu fyri 400,- Nýprísur 800,-
*Tlf. 214800*

**EIN YAMAHA NEOS TIL SØLU**
Skutarin er uml. 8 ára gamal og hevur koyrt uml. 12628 km. Men við tundeilum hevur hann bara koyrt uml. 800 km. skutarin er nógv tunaður, men manglar bara tun útstoyt og nr. plátu. skutarin er ný lakeraður, og kann sígjast á
*www.sel.fo.. ring á tlf. 261192*

**HONDA SKUTARI YNSKIST TIL KEYPS**
Ein Honda X8R ynskist til keyps sum skjótast. Vinarliga ring
*214999 ella 219152*

**SUZUKI 600F**
til sølu vegna flyting til DK. Sær gott út, nýggj dekk og hjálmur, buksir, handskar er við fyri kr. 42.000,- Ring og hoyr nærri
*Tlf. 226880*

**SÚKKLA TIL SØLU**
Sort Raleigh damecykel med kurv og barnestol. Kr. 500,-.
*Tlf. 503419*

**VESPA ET2 SKUTARI**
til sølu. Koyrt 4.700 km, í góðum standi.
*Tlf. 272717*

**SKUTARI TIL SØLU**
Ein Peugeot skutari til sølu. Ring og hoyr nærri.
*Tlf. 317621*

**TIL SØLU**
Ein Derbi GP1 skutari, 3 ár, í góðum standi.
*Tlf. 373380*

## Teldur

**TIL SØLU**
8 Playstation 1 spøl og 2 playstation 2 spøl bíliga til sølu.
*Tlf. 448158*

**PRINTARI**
Olivetti JP190. Prísuppskot 400,- kr.
*tlf. 263733*

**XBOX TIL SØLU**
2 Gamepad, 1 DVD kit og 9 spøl fyri einans 1.100 kr.
*Tlf. 456484*

**TIL SØLU**
1x 3200+ AMD barton socket A, 1.100 kr. MSI K7N2, Delta ILSR botnkort 400 kr. 3x 512 MB DDR FSB 400, 3200, tvey eru duel channel, 500 kr. stk. Radeon X800 Pro 2.300 kr.
*Tlf. 258496*